HEILSANIR

Góða fitta dóttir og systi
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini
Ynskja mamma, babba og beiggji

Hesi pørini hava gull- og silvurbrúðleyp 17. og 20. nov. Hjartaliga tillukku við døgunum og nógv góð ár afturat. Jesus signi tykkum. Her eru tit ung og grøn.
Heilsan ja, gita nú, síggjast

Elskaði babba!
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 11. nov. Alt tað besta í framtíðini. Hetta var ein deiligur skógtúrur í Hammer bakker. Muss muss,
Sofía
P.s. Mamma letur heilsur

Góða Signhild
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 14 / 11 alt tað besta í framtíðini
Ynskja Karina og Silas

Góða Signhild
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum sunnudagin. Jesus pápi signi frammtíð tína
Ynskja omma, abbi og langomma

Góði Viggo
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum tann 14. nov.
Ynskja omma og abbi í Leirvík

Góði Jósup
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum. Nógv góð ár í framtíðini.
Bestu heilsanir vit

Eftirlýsing
Hvør eigur meg! Eg leiti eftir teimum sum eiga meg. Er tað nakar ið kennist við meg? (kettlingurin er tikin upp á Ternuryggi)
Ring tel. 316135 ella 212153

Góða Rebekka
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 14. nov. Jesus pápi verið hjá tær.
Ynskja mamma, babba og Barbara

Góði elskaði Hallur
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 12. nov.
Kærar heilsanir mamma, babba, Rani, Tóki og Markus

Góða elskaða omma og mamma
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum og takk fyri alt tú ert fyri okkum. Alt tað besta í framtíðini.
Ynskja Elisabet, Sólva, Julian, Leila, Annika, Jan og Joan

Góða Rebekka
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum í morgin. Jesus pápi signi framtíð tína.
Omma og abbi

Góði Óli
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum.
Ynskja tyttomma og abbi

Góða langomma
Hjartaliga tillukku við 80 ára degnum tann 11/11. Muss og klemm frá
Petur

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Gudstænastur
23. sunnudag e. trinitatis
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein
Vesturkirkjan: kl. 11,
Kirkjubøur: kl. 12.30, Bergur D. Joensen
Hvítanes: kl. 11, Bjarni Bæk
Kollafjørður: kl. 12, Skótarnir 20 ár, Uni Næs
Hestur: kl. 12, Heri Joensen
Haldarsvík: kl. 12, Marjun Bæk
Eiði: kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
Friðrikskirkjan: kl. 11, Martin R. Jacobsen
Glyvrar: kl. 11, lestur. Kl. 20 Vesper (aftansongur).
Søldarfjørður: kl. 11, altarg., (innsavnan), Meinhard Bjartalið
Fuglafjørður: kl. 12, Rolf Tunnar Heitmann, aðalskrivari hjá norsku Ísraelsmissiónini. Talvan gongur fyri Ísraelsmissiónina
Christianskirkjan: kl. 11, Niels Pauli Danielsen
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10,
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30
Kunoy: kl. 12, altarg., Jóannes Fonsdal
Hvannasund: kl. 12, Elsa Funding
Miðvágur: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Sandavágur: kl. 12, David Johannesen
Eldrasambýlið í Vági: kl. 14, Patrick de Neergaard
Fámjin: kl. 12, Jónsvein Bech

70 ÁR

Leygardagin 20. november verður Sólgerð Hansen Norberg, Tórshavn, 70 ár. Opið hús verður í heiminum frá kl. 10.00 til 16.00.

BRÚDLEYP

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn, Annika Jørgensen, Sørvágur og Magni Reinert, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til teirra stóra dag, verða biðin um at tekna seg á tlf. 212480, 216185 ella 220145 áðrenn 5. desember.

Leygardagin 25. september *giftust* í Trinidad, Jan Erik Niclasen, Søldarfjørður og Nelia Daize, St. Vincent. Brúdleypsveitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík 4. desember kl. 18.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 441800 ella 581800 áðrenn 20. november.

4. desember giftast í prestagarðinum á Brekku í Klaksvík, Mary Ziska og Heri Henriksen, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá á tlf. 459016, 223016 ella 262387 í seinasta lagi 25. november.

2. juli í 2005 giftast í Noreg, Tone Blindheim, Bartavik, Noreg og Johnny Willumsen, Hvalba. Tit, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, vinarliga sigið okkum frá sum skjótast og helst áðrenn 15. november, so vit kunnu útvega bústað til brúdleypsgestirnar. Sigið frá á tlf. 375239 ella 251984.

SILVURBRÚDLEYP

Tann 17. november hava hjúnini Sigrid og Palle Sivertsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum fríggjadagin 19. november frá kl. 18.

Mikudagin 17. november kunnu hjúnini Turið og Tummas Lervig halda silvurbrúdleyp. Opið hús verður undir Brúnni 21 í Klaksvík. Øll eru vælkomin.

24. november hava Andrea og Thorleif Isaksen, Søldarfjørður, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 27. nov. kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við silvurbrúðarparinum kunnu boða frá innan 17. november á tlf. 441687 ella 211687.

GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 20. november kunnu hjúnini Torgerð og Hjørleif Waag Høgnesen, Klaksvík, halda gullbrúdleyp. Tey, sum vilja heilsa gullbrúðarparinum eru vælkomin í kirkjukjallaranum frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 20. november kunnu hjúnini Margretha og Levi Joensen, Klaksvík, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Betesda frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tann 4. desember hava hjúnini Hansa og Benjamin (Benni) Joensen í Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 16.00. Øll eru vælkomin.

Samkoman við Marknagil
Møtini sunnudagin og mánakvøldið, eru avlýst vegna samfelagsmøtini.

Nardus-samkoman
Møtir verða við evangelisti Torkild Terkelsen á Suðurrás 12, leygarkvøldið kl. 20 og í Losjuni við Tinghúsvegin sunnukvøldið kl. 18.

Frá missiónshúsinum v/ Landavegin
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Martin Thomsen.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Leygardagin kl. 20 Heystmøti v/ Alfred Olsen, Saltnes.
Evnið: Messias – Jesus og signing hansara.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 14 Junior, kl. 18 Heystmøti v/ Alfred Olsen, Saltnes.
Evnið: Jesu afturkoma.
Týsdagin kl. 17 Barnakórið.

Sjómanskvinnuringurin í Havn
Vit møtast á Sjómansheiminum í Havn mánakvøldið kl. 19.30.

Hebron, Argir
Sunnudagin verður einki møti í Hebron vegna samfelagsstevnuna. Eingin sunnudagsskúli verður, men barnamøti verður í Høllini á Hálsi kl. 12.15, har øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 19 Ungdómstiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. fl. www.hebron.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Finn Arvé prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli. »Hann fer undan tykkum til Galileu; har skulu tit síggja hann, soleiðis sum hann hevur sagt tykkum«. Mk. 16,7.
Mikukvøldið tann 17. nov. kl. 19.30 fyrireika vit okkum til Adventina, saman við Finn Arvé presti. Aftaná verður ein kaffimuður í Meinigheitshølinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frá Ebenezer
Samfelagsmøti í Ebenezer 10.-14. november 2004
Fríggjadag kl. 10 og 15 Uppbyggingarmøti, kl. 20 Evangel. møti í Høllini á Hálsi, kl. 22.30 Opið hús
Leygardagin í Høllini á Hálsi: kl. 16 Uppbyggingarmøti, kl. 20 Evangel. møti, kl. 22.30 Opið hús.
Sunnudagin í Høllini á Hálsi: kl. 10 Breyðbróting, kl. 12.15 Barnamøti, kl. 16 Uppbyggingarmøti. Nátturði verður í Høllini beint aftan á møti, kl. 19 Evangl. møti. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Rolf Gunnar Heitmann, aðalskrivara í Norsku Ísraelsmissiónini.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Agnari Nielsen úr Vestmanna.
Týsdagin: Várgleði fyri børn.

Filadelfia
Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Onnu Guttesen, evnið er: Umsorgan 2. partur, kl. 18 Møti v/ Magna Christiansen.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Vikuskiftisfundir har major Njál Djurhuus talar, verða fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 11 og 18. Øll eru vælkomin.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøtir.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/ Jóan P. Johannesen.
Evnið: Profetar, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Ongi møtir vera um vikuskifti vegna samfelagsmøtini í Ebenezer.

Saron, Vestmanna
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18 við Malenu og Jens Meitilberg úr Tórshavn.
Mánadagin 15. nov. verður ungdómsmøti kl. 20. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Miðvágs missiónshús
Missiónsvikan heldur áfram við møti leygarkvøldið kl. 19 v/ Kristian Fríðrik Olsen og Streingjakórinum í KFUM og K úr Klaksvík. Barnaansing er fyri tey smærru børnini.
Innsavnan til Missiónshúsið.
Eftir møti er drekka.
Leygarkvøldið kl. 22 Ungdómsløta við luttøku úr Klaksvík.
Sunnudagin kl. 14.30 Familjumøti. Ung úr Sørvági luttaka. Kl. 18 Hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Kollafirði
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við meinigheitskórinum úr Tórshavn.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og møti kl. 19. Innsamligt til húsið.
Aftaná møti verður drekka og hugnalig samvera.

Norðskála kirkja
Kirkju- og missiónsvikan heldur fram í dag og í kvøld.
Kl. 17 barnamøti, kl. 19.30 Bibliutími: Kolossubrævið, kl. 20 Møti við Sylveriusi Jacobsen, Skála.
Í morgin, 23. sunnudag e. trinitatis kl. 12 lestur, kl. 18.30 Bibliutími: 1. Tessalónikubrævið, kl. 19 Møti við Regini Høgnesen, trúboðara.

Eiði
Kirkju- og missiónsvikan byrjar í morgin – 23. sunnudag e. trinitatis – við skriftamáli kl. 11.40, messu kl. 12 og heldur fram alla vikuna við gudstænastum og møtum.
Mánakvøldið verður katekismusgudstænasta í kirkjuni kl. 20. Evnið: Samfelag teirra heilagu.

Sjómanskvinnuringurin í Runavík
byrjar aftur mánakvøldið kl. 19.30 í húsinum hjá kvinnufelagnum á Glyvrum, mint verður á jólapakkarnar. Allar kvinnur eru vælkomnar at vera við.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Maibritt og Kaj Otto
Sunnudagin kl. 17: Møti við Osbjørn og Egil. Manskórið syngur. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Lívsins Orð, Saltangará
Sunnudagin er møti kl. 10.30.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti v/ Odu Jakobsen, Tórshavn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagin verður Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor kl. 14.30. Barnakórið venur kl. 15.15 og møti kl. 18.

Tabor, Toftir
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Fjølmiðlar: Tað sum vit hoyra og síggja v/ Una Næs form. og øðrum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Aglow-fundir
vera í Stranda Sentrum leygardagin kl. 15.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Og Jesus segði: »latið smábørnini koma og forða teimum ikki at koma til mín; tí at himmiríki hoyrir slíkum til.« (Mt. 19, 14).

Vit kenna tey øll aftur, fólk við følskum autoriteti, sum selja sína sál fyri at fáa makt. Tað var millum annað hetta, sum H. C. Andersen sipaði til í ævintýrinum um tann nakna keisaran, sum øll hildu var í so fínum klæðum, at tey høvdu ikki sæð makan. Vit síggja tey fyri okkum, tey marchera, eitt tvey, eitt tvey, eitt tvey; tað er altíð okkurt militert yvir tí falska autoritetinum, og fólk jubla, tað er eisini altíð okkurt sjálvniðurgerandi yvir tí falska autorietinum, tí undirsáttarnir fylgja við, uttan at hugsa um avleiðingarnar. Og so bráddliga rópar ein smádrongur: »Júmen, hann er jú nakin!« Bráddliga fór allur hugaheimurin hjá teimum vaksnu í grús, tí at ein smádrongur avdúkaði ein autoritet, sum einki annað bygdi á enn tómleika.

Nú skilja vit kanska eisini betri Jesu orð, táið hann sigur, at eingin trýr so nógv sum tað lítla barnið. Vaksin trúgva ikki uppá sama máta, vit pynta okkum við læntum fjarðum, við uniformum, við materiellum tingum, við fínum titlum, við samkomuheitum, o.s. fr. Hjá vaksnum snýr tað seg meira um at hava, enn at vera, og tískil verður tilveruvitskan hareftir, bæði avskorin og sundurskorin. Børnini, harafturímóti, eru bara, og hjá teimum er einki, sum letur aftur fyri tilveruni, uttan vaksnamannaheimurin, sum við sínum avmarkingum livir av at seta mørk og í bás. Jesus ger greitt, at uttan henda barnaheim var eingin trúgv eftir, eingin vón, eingin kærleiki – og eingin spontanitetur, sum rópar, at keisarin er nakin!

Í bíbilskari talu eru vit øll nakin. Kenslur, álit og kærleiki, angist, óvissa og hungur eftir forstáilsi, meining, fyrigeving og ríkum menniskjalívi goymast í okkum øllum, handan maskuna, og eina væl poleraða skræðu. Evangeliið er, at Jesus sær afturum skræðuna, sær barnið í okkum, og við tilsøgnini um, at eingin kann slíta hetta barnið úr Guðs hondum, kunnu vit gleðast um, at dagurin er okkara, og at lívið er her og nú - og fyri framman.

Ólavur Rasmussen